# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulspedagogi/hjálpara til eina 3 ára gamla gentu í Runavíkar kommunu, at byrja skjótast gjørligt.

Endamálið við stuðlinum er í samstarvi við barnaverndarnevndina, foreldur og ansingarstovn at seta mørk og menna gentuna sosialt og málsliga. Arbeiðsstaðurin er ansingarstaðið hjá barninum.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna og starvið verður sett fram til 31. juni 2006.

Barnaverndarnevndin skipar fyri, at stuðulsfólkið fær ráðgeving.

Ynskisligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður at senda Barnaverndini í seinasta lagi fríggjadagin 4. november.

**Barnaverndarnevndin**
Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26
600 Saltangará

Runavíkar Kommuna

---

www.alzheimer.fo

## KUNNING UM DEMENSSJÚKUR

Í Stóra pakkhúsinum í Vági

hóskvøldið 27. oktober kl. 19.00

Erla Zachariassen, sjúkrarøktarfrøðingur, fer at greiða frá:

- Hvat er demens ?
- Hvørji tekin kunnu avdúka møguligt demens ?
- Hvussu arbeiðir minnið saman við kenslum ?
- Hvussu kunnu avvarðandi veita góða umsorgan ?

Hesi og onnur viðkomandi evni verða viðgjørd.

Borðreitt verður við kaffi og køkum. Fyrilesturin er ókeypis, øll eru hjartaliga vælkomin.

Alzheimerfelagið

Sosialurin 341800

*Hagtøl siga, at av øllum, ið eru eldri enn 65 ár, fáa 7% demens, og 20% av teimum, ið eru farin um tey 80*

---

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

## HUGNALØTA VIÐ FYRILESTRUM

BÓT TIL BATA SKIPAR FYRI HUGNALØTU VIÐ ALMENNUM FYRILESTRUM Á HOTEL HAFNIA

Eliesar Olsen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, heldur fyrilestur um skurðviðgerð av bróstkrabba. Eisini fer hann at røða um nýggjastu viðgerðarhættirnar og um møguleikar fyri at varðveita bróstini umframt endurnýggjan ella endurgerð av skurðviðgjørdum brósti.

Inga Poulsen Dam, prestur, heldur fyrilestur um lívsdygd í sambandi við lívshóttandi sjúku

Paula Jespersen úr sangbólkinum SALT fer at syngja og Arnvør á Torkildsheyggi spælir undir

HUGNALØTAN VERÐUR
Á HOTEL HAFNIA
LEYGARDAGIN 29. OKTOBER KL. 15.00
ØLL ERU HJARTALIGA VÆLKOMIN

BÓT TIL BATA

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

---

Til Vistarheimið á Fugloyarvegi 1, sum er heim fyri yngri brekað, verður søkt eftir einum

# hjálparfólki

til at arbeiða í dagvakt frá kl. 8 til 16 aðru hvørja viku.

Løn sum sjúkrahjálparar uttan útbúgving.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Vistarheimið**
Fugloyarvegur 1
100 Tórshavn

**Fyri Vistarheimið**
Karolina Petersen

---

# Útbjóðing

Vegna Fuglafjarðar kommunu verður arbeiði í samband við gerð av egningarmiðstøð á havnarlagnum í Fuglafirði boðin út í almennari útbjóðing.

Arbeiðið umfatar gerð av 330 m² stórum bygningi í einari hædd. Í høvuðsheitum umfatar arbeiðsveitan gerð av út- og skilaveggjum og gólv, úr staðstoyptari betong, timbur yvirtrom, klæðing og bjálving av útveggjum og ísetan av vindeygum og hurðum. Somuleiði skulu kloakkleiðingar gerast frá bygninginum.

Lisitatiónin verður í Býráðshúsinum í Fuglafirði tann 15. november kl. 14.00 og kunnu teir í boðið hava, verða hjástaddir.

Útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Fuglafjarðar kommunu, áðrenn fríggjadagin 28. oktober 2005 á tlf. 444006, ella e-mail: patur@fuglakom.fo móti veðhaldi kr. 10.000,- sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka nr. 6460 2205965.

Fuglafjørður, tann 24. oktober 2005

**Fuglafjarðar kommuna**
**tekniska deild**

---

# Lærari til Tofta skúla

Fyri lærara í barnsburðarfarloyvi verður hervið søkt eftir lærara í tíðaravmarkað starv frá 9. november 2005 til 10. mars 2006 (4. mðr.).

Talan er um fulla tímatalvu umfatar:

- Føroyskt, sang, heimstaðarlæru, evning og ítrótt í 1. fl.
- Føroykst í 3 fl.
- Enskt í 6 fl.
- Serligur tørvur

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. november 2005.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at tosa við skúlastjóran, telf. 447332.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir

---

# Felagsskúlin á Oyrarbakka

**Skúlavegur 8 - 400 Oyrarbakki**

**Almenn svimjing byrjar 27. oktober 2005.**

Svimjihylurin er opin hesar tíðir:

| | |
|---|---|
| Týskvøld: | kl. 19-20 fyri familjum |
| | kl. 20-21 fyri pensionistum |
| Hóskvøld: | kl. 19-20 fyri børnum |
| | kl. 20-21 fyri vaksnum |

---

# LANDSFUNDUR

Landsfundur Fólkafloksins verður á Hotel Hafnia í Tórshavn leygardagin 26. november kl. 10.00.

Nærri verður lýst seinni.

Fólkaflokkurin

---

# Hondlesing í Tórshavn í november

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Eg síggi tína fortíð, nútíð og framtíð.

Ein annarleiðis máti at síggja teg sjálvan og kanska broyta nakrar atburdir?

**Vinarliga ring og bið um tíð á tlf. 0045 39664880 ella 0045 31168053**